# Konditaríið letur upp í morgin

**Konditaríið skal aftur vera tað góða gamla Konditaríið - og nýggi eigarin vil fegin hava gomlu stammgestirnar at koma aftur**

KONDITTARÍIÐ

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*- Eg ætli mær at fáa gomlu virðini fram aftur í Konditarínum, sigur Uni Gullfoss, sum nú letur Konditaríið í Niels Finsensgøtu uppaftur*

*Mynd: Teitur Joensen*

Gamla konditaríið letur upp aftur í miðbýnum í Havn í morgin. Tað er Uni Gullfoss, sum hevur keypt staðið, og hann ætlar at fanga tey gomlu virðini, sum eyðkendu gamla konditaríið.

- Eg ætli at fáa gomlu virðini fram aftur í konditarínum. Ætlanin er at fáa myndir av gomlu Havnini, at hanga inni í konditarínum, soleiðis at umhvørvið verður merkt av gomlu tíðini. Harafturat hevði tað verið stuttligt, um vit fingu menninar, sum plagdu at sita á gamla konditarínum, at koma aftur higar.

Hann leggur eisini stóran dent á, at hetta staðið verður einasta roykfría café í miðbýnum, og hann vónar, at hetta fer at fáa fleiri kundar á konditaríið.

Í niðaru hæddini er roykfrítt, meðan roykjarar kunnu fara upp á ovaru hæddina, um teir vilja roykja.

Fyri at finna fram gamla stílin, so hevur Uni Gullfoss eisini roynt at fingið fatur á gomlu matskránni.

- Ætlanin er at fáa fingrar á gomlu mátskránni, soleiðis at vit skulu fáa mest møguligt at vera sum fyrr. Hetta hevur ikki eydnast ordiliga enn, men vit arbeiða við hesum. Harafturat ætla vit at hava okkurt nýtt afturat gomlu matskránni, soleiðis at úrvalið hjá okkum verður meir fjølbroytt.

# Aftankvirran fær góða undirtøku

**Fríggjakvøldið var fjórðu ferð, at skipað var fyri aftankvirru í Havnar kirkju. Fyrsta fríggjakvøld í hvørjum mánaði hevur kirkjan verið opin millum kl. 21 og 23, og nú hevur tiltakið verið í Havnar kirkju í fýra mánaðir**

AFTANKVIRRA

*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

- Tað hava verið frá 25 til 45 fólk til aftankvirrurnar, sigur Helgi í Brekkunum, sum er limur í kirkjuráðnum í Havnar kirkju.

- Hetta er meir enn eg hevði væntað áðrenn vit byrjaðu. Tí hetta er ikki vanligt at hava í Føroyum, greiðir hann frá.

- Í okkara grannalondum er tað vanligt at kirkjurnar eru opnar, til dømis í Danmark, Noregi og Svøríki hava tey líknandi tiltøk.

Tað hava tey eisini merkt, tí í summar vóru fleiri útlendingar til tiltakið. Útlendingarnir hava bæði verið ung og eldri fólk, men tað hava ikki verið nógvir ungir føroyingar.

Frá kl. 21 til 22 er friður, har fólk kunna koma og seta seg niður og vera fyri seg sjálvi eina løtu. Henda løta kann nýtast til umhugsan og meditatión.

Frá kl. 22 er sangur ella tónleikur í ein hálvan tíma. Fríggjadagin var tað Petra Iversen, sum sang sálmar og kingosangir.

Tann síðsti hálvi tímin verður brúktur til eina stutta andakt, og síðan kunnu fólk fáa sær ein drekkamunn í forkirkjuni, um tey hava hug til tað.



Næstu ferð aftankvirra verður er 3. november, tá fer barnakórið úr Havnar kirkju at syngja.

## Norðurlendskur fundur í Lymfødemfelagnum

**Fríggjadagin og leygardagin helt Lymfødemfelagið fund saman við nevndunum úr lymfødemfeløgunum úr Noregi, Danmark og Svøríki**

*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Lymfødem er ein sjúka, sum kemur av ov nógvum gróðrarvatni í vevnaðinum og vísir seg við, at bein ella armar gerast hovin. Lymfødemfelagið í Føroyum var stovnað fyri tíggju árum síðani og hevur í dag 55 limir. Umleið 80 sjúklingar eru í viðgerð fyri lymfødem í Føroyum. Sjúkan kann raka øll, men rakar flest kvinnur. Hon kann vera viðfødd, men kann eisini verða ein fylgja eftir eina skurðviðgerð.

Hetta er fyrstu ferð at lymfødemfeløgini úr Norðurlondum hava ein felags fund, men talan er nú um, at gera hetta til eitt afturvendandi tiltak.

Á fundinum hava nevndarlimir úr øllum Norðurlondunum sagt frá, hvussu tað gongur við sjúkuni og viðgerð í ymisku londunum.

- Vit hava fingið nógv at vita á fundinum, og hava hoyrt fleiri uppskot, sum vit kunnu arbeiða víðari við, sigur Harriet Nybo, formaður í Lymfødemfelagnum.

Ætlanin er, at feløgini skulu samstarva um ymiskar verkætlanir. Til dømis fer Lymfødemfelagið í Føroyum at fáa ymiskt tilfar úr Noregi og Svøríki, sum tey har nýta til at upplýsa sjúklingar og onnur um sjúkuna.

## Úr politirapportini

**Herverk:** Fríggjakvøldið var herverk gjørt í miðbýnum í Havn, har tveir persónar kastaðu steinar og brutu tveir rútar í Sparikassanum, sum venda ímóti gongugøtuni. Onkur vitni vóru, men eingin er enn tikin.

**Maður datt á sjógv**

Leygarnáttina koyrdi ein taxabilur tríggjar rúsaðar menn út á vestaru bryggju. Á veg umborð á skipið datt ein av monnunum niður ímillum bryggjuna og skipið, hann varð háladur upp aftur beinanvegin, og eingin skaði hendi.

**Steinur ígjøgnum rútin á bili**

Leygarmorgunin var ein maður í bili á veg úr Vestmanna, á veg niðan frá Vestmanna kom ein steinur inn gjøgnum forrútin á bilinum og fór beint út ígjøgnum bakrútin. Løgreglan kennir ikki orsøkina.

**Motorsúkkla koyrdi á seyð**

Leygarkvøldið koyrdi ein motorsúkkla á ein seyð á Oyggjarvegnum. Seyðurin doyði og motorsúkklan fór út av vegnum. Førarin meiddi seg nakað av fallinum, men kláraði sjálvur at koyra aftur til Havnar.

**Innbrot**

Sunnudagin var eitt innbrot í Dagstovninum á Løgmannabreyt, har ein brævbjálvi við peningi var stolin.

**Koyrdi ov skjótt**

Sunnudagin var ein bilførari tikin fyri at koyra ov skjótt í Kaldbaksbotni. Hann koyrdi 116 km/t har loyvt var at koyra 80 og fær tí eina bót.